gult38 cyan38 magenta38 svart38

TILTØK

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Jesus svaraði og segði við hann: Elskar nakar meg, tá varðveitir hann orð mítt, og faðir mín skal elska hann,og vit skulu koma til hansara og gera okkum bústað hjá honum.
Joh. 14-23

Tað sum hendi hina fyrstu Hvítusunnuna, fyri nú næstan 2000 árum síðani, vakti undran hjá mongum og hevur ivaleyst eisini vakt spurningar, tí her var nakað heilt, heilt serligt á ferðini.

Men størri undur er tað at hin kristna kirkjan víða um heimin, sum tá gjørdist veruleiki, enn skal vera til. At »Andin«, sum tá blásti lív í »Orðið« sum lærusveinar Harrans talaðu, skal enn hava somu kraft og verða spædikað á fleiri tungumálum enn nakrantíð áður. Hetta skuldi givið okkum nakað at hugsa um. Her er talan um lív.

So kunnu vit spyrja, hvussu hin Heilagi Andin kemur til okkara? – Hesum hevur Jesus Kristus svarað tá hann sigur: »Tann sum elskar meg, hann varðveitir orð míni, og faðir mín skal elska hann og vit skulu koma og gera okkum bústað hjá honum«.

At hoyra og varðveita. Tað er tað sum týdning hevur, og tað er við hesum, at hin Heilagi Andin kemur til okkara. Við ORÐINUM sum hoyrt verður, kemur hin Heilagi Andin til okkara.

Um hetta alt kunnu vit lesa í øðrum kapitlinum í Apostlasøguni. Har síggja vit hvussu hin Heilagi Andin prædikar, og hvussu hin Heilagi Andin verður givin. Her hava vit hvítusunnuprædikuna hjá Pæturi apostli. Henda prædikan er sera greið og einføld. Pætur hevur helst ikki verið størri prædikumaður enn hinir – men hann byggir prædikuna sína á skriftina; vitnar um Jesus Krist, peikar á hann sum krossfestur er fyri syndir okkara, risin upp og hevjaður upp til æviga dýrd. – Og tey sum tóku ímóti orðinum fingu hin Heilaga Andan, nýggja kraft, nýtt lív.

Hetta er Hvítusunnan – Hon kemur til okkara í ORÐI Guðs, tá vit hoyra hetta boðað í Jesusar navni. Tá vit hugsa um tað, boyggja okkum fyri tí og biðja. Hvítusunnan er har, tá vit vilja liva sum Guðs børn í tí felagsskapi Kristus hevur kallað okkum til.

Hon er har tá Jesus Kristus, hin sanni og frælsi, ger okkum sonn og fræls.

Gleðiliga Hvítusunnu.
Amen.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli og onki møti vegna Hvítusunnustevnuna.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Hvítusunnudag kl. 11 hámessa við Anders Baadsgaard Jensen í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Eingin sunnudagsskúli verður í morgin.
2. Hvítusunnudag kl. 11 hámessa við Anders Baadsgaard Jensen í Mariukirkjuni.

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Tað er makt í bøn. Kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

Rhema á Hálsi
Mikukvøldið onki møti. Vegna Hvítusunnustevnuna á Nabb við Aril Edvardsen úr Noreg, vera ongi møti í Rhema.

Ebenezer
Hvítusunnudag kl. 10 breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. møti, kl. 21 útimøti.
2. Hvítusunnudag kl. 18 evangel. møti.

KFUM og KFUK í Havn
Sunnudagin 24. juni kl. 14 gera KFUM og KFUK útferð um viðrar við Norðlýsinum, vestur um Hestoynna. Sigið frá áðrenn 11. juni á tlf. 311928 vilja tit við. Havi matpakka og okkurt drekkandi við. Ferðin varar 5 tímar. Luttøkugjald 200 kr.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 10 og kl. 19 Hvítusunnustevna í Ítróttarhøllini á Hálsi, kl. 22.30 lovsongskonsert í Ítróttarhøllini á Hálsi. 1. Hvítusunnudag kl. 11 og 18 og 2. Hvítusunnudag kl. 11 og 18 Hvítusunnustevna í Ítróttarhøllini á Hálsi. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Meinigheitshúsið
Leygardagin kl. 16.30 bønarløta – kvinnur.
Hvítusunnudag kl. 18 møti við fólki frá Logos II.
2. Hvítusunnudag kl. 18 møti við Bergur D. Joensen.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Heimasíða okkara: www.koma.fo

Saron, Vestmanna
Onki møti í vikuskiftinum vegna Hvítusunnumøti í Havn.

Filadelfia, Sundalagið
Einki møti verður um Hvítusunnu vegna Hvítusunnustevnu í Havn.

Ørkin, Saltangará
Evangeliskt møti verður í Arbeiðarafelagshúsinum »Hæddini« í Saltangará sunnudagin kl. 17.00. Møguleiki er at fáa forbøn.

Missiónshúsið í Leirvík
Í kvøld verður einki ungdómsmøti. Ístaðin fara vit til Logos ungdómstiltak í ítróttarhøllini í Runavík. Bilar koyra frá missiónshúsinum kl. 21.30.

80 ÁR

Í dag verður Svenning Olsen á Marknagarði, Glyvrar, 80 ár.

85 ÁR

Grundlógardagin 5. juni fyllir Hjørleif Enni, Tvøroyri, 85 ár. Hann er at hitta í heiminum millum kl. 11.00 og 13.00

BRÚDLEYPIÐ ÚTSETT

Brúdleypið hjá Joan Miðberg, Saltangará og Eddie Mikkelsen, Søldarfjørður, ið skuldi vera 2. juni er útsett vegna sjúku.

PRÓGV

Beinta Nielsen hevur tikið prógv sum Sosial- og sunnheitsassistentur á Sosial- og sunnheitsskúlanum í Brøndby.

Eysturoyingar & Norðstreymoyingar

Hvítur posi frá IRF

Hvørt húski hevur fingið 8 pappírsposar.

Posarnir eru til reint og turt pappír og papp.

Ein hvítur posi verður tikin

frá hvørjum húski 5. hvørja viku.

Hvítur posi við øðrum burturkasti enn pappíri og pappi verður ikki tikin.

Vegna verkfall er heintingin flutt eina viku.

Fyrsti hvíti posin verður heintaður soleiðis:

Týsdag 5. juni	**Rituvík, Æðuvík, Runavík og Lamba**
Mikudag 6. juni	**Skipanes, Søldarfjørður, Saltnes, Toftir og Nes**
Hósdag 7. juni	**Oyndarfjørður, Hellur, Skálabotnur, Skála, Syðrugøta, Gøtugjógv og Norðagøta**
Fríggjadag 8. juni	**Fuglafjørður og Kambsdalur**

IRF

Alt til gosbaði

Sóttreinsievni 2, 5 l..... 399 kr
Sóttreinsievni 125 ml.....95 kr
Klortablettir fyri. Stk .....2 kr
Skúmdempari 1 l .....447 kr
Bonivoks 1 l.....429 kr
Filturreinsievni 1 l .....315 kr
Vatnangi fýr 250 ml.....198 kr
Vatnangi eucal. 250 ml.....198 kr
Njóti gosbaði enn meiri, við rætta tilhoyrinum.

Rør&Blikk
Tlf.: 322 999 , fart.: 225 345
www.rorblikk.fo

gult39 cyan39 magenta39 svart39

HEILSANIR

Øllum tykkum, sum við vitjan, gávum, kortum og á annan hátt gleddu meg á konfirmatiónsdegnum 11.05.01 takki eg hjartaliga. Eisini ein serlig tøkk til ommu.
Blíðar heilsanir
Hansy Thomsen,
Granagøta 22 Tórshavn

Góða Herdis
Lukku og gleði á tínum 10 ára degi, sum er tann 5. juni og alt tað besta í framtíðini.
Heilsan mamma, babba og beiggi

Tillukku við degnum 4. juni og vælkomin heimaftur.
Mamma og pápi

Góði Ólavur gubbi
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum, sum var 27. mai.
Ynskja vit 4 á Oyri



Góða elskaða Ása!
Lukku og gleði á tínum 4 ára degi 4. juni. Jesus signi framtíð tína.
Heilsan mamma, babba, Súni og Sonny

Góða Súsanna!
Hjartaliga tillukku á 40 ára degnum í dag, hvør skuldi trúð tí, tú líkist einari 25 ára gamlari.
Alt tað besta
frá hold 2000

TILTØK

FØÐINGAR

23. mai fingu Ann og Palli Askham, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3100 gr.

25. mai fingu Rudi Kollslíð og Herálvur Joensen, Skála, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3550 gr.

26. mai fingu Anita Heinesen og Árant Olsen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 2930 gr.

26. mai fingu Berit Jacobsen og Benni Poulsen, Argir, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2900 gr.

26. mai fingu Mari og Hendrik Olsen, Lambi, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3700 gr.

27. mai fingu Joan Mikkelsen og Tórður Nesstein, Toftir, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3800 gr.

28. mai fingu Marjun Johnsdóttur og Eli Eiriksson, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3800 gr.

30. mai fingu Sólva og Eyðstein Poulsen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 4200 gr.

31. mai fingu Anna Katrina og Jón Simonsen, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4350 gr.

21. mai fingu Guðrið Undir Kletti og Ingi Waag Høgnesen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3830 gr. Her situr stóribeiggi Havgrímur undir didduni.

ANDLÁT

24. mai
John Martin Jacobsen, vanliga nevndur Martin í Lon í Fuglafirði, 81 ár
Kristian Hvidbro í Klaksvík, 74 ár
Hans Samuelsen í Haldórsvík, 57 ár
Torberg Gudmundsson av Tvøroyri, 85 ár

25. mai
Kristian Hansen, Fuglafjørður, 74 ár
Jakobina Joensen í Kvívík, vanliga nevnd Bina, 76 ár

28. mai
Árni Jacobsen, í Havn, ættaður úr Hvalvík, 67 ár

29. mai
Kristina Olsen í Vestmanna, 80 ár

30. mai
Janus Poulsen, ættaður av Sandi, búsitandi í Havn, 80 ár

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygard. 2. juni: Magnus á Stongum, tlf. 423006
Sunnud. 3. juni: Sverri Lamhauge, tlf. 448016
2. Hvítusunndag: Sverri Lamhauge, tlf. 448016

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

SILVUR-BRÚDLEYP

Hósdagin 21. juni hava hjúnini Andor og Jona Isaksen í Klaksvík silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í Skálanum fríggjakvøldið 22. juni kl. 19.30. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, verða vinarligast biðin um at siga frá áðrenn 1. juni á tlf. 456515 ella 250247.

BRÚDLEYP

Í dag, 2. juni kl. 17.00 giftast í Havnar kirkju Esther Lindenskov, Tórshavn og Hjalmar Hvítklett, Sørvágur. Brúðarveitslan verður fyri innbodnum í Pállstovu.

Leygardagin 16. juni kl. 14 giftast í Kelduni í Skálabotni Olivia H. Joensen, Skálabotn og Jákup Súni Berg, Tórshavn. Veitslan verður í Leguhúsinum í Nesvík kl. 20.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 1. juni á tlf. 441596, 315003 ella 254404.

Leygardagin 16. juni kl. 16.00 giftast í prestagarðinum í Vági Gunnbjørg Magnussen, Vágur og Torri Thomsen, Sumba. Brúðarveitslan verður í samkomuhúsinum í Sumba kl. 19.00 fyri innbodnum gestum.

Leygardagin 23. juni kl. 15 giftast í Christianskirkjuni, Oddbjørg Askham, Hvannasund og Rúni Sigurðsson, Klaksvík. Vælkomst verður á Hotel Norð kl. 20.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at vera við, verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 1. juni á tlf. 457514, 452002 ella 457522.

Leygardagin 30. juni kl. 15.00 giftast Benadikta Sofía Kruse og Sven Bergur Jensen í Adventistakirkjuni í Tórshavn. Vælkomst verður í Niels Finsensgøtu 32, frá kl. 21.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við luttøku, vinarliga gevið boð áðrenn 12. juni á tlf. 0045 38113519.

HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56

Leygardagin 02.06. kl. 19[00]
Leygardagin 02.06. kl. 21[15]
Leygardagin 02.06. kl. 23[30]

Leygardagin 02.06. kl. 22[45]

Leygardagin 02.06. kl. 20[00]

HAVNAR BIO er stongt Hvítusunnudag

☆ BIO ☆
KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

www.in.fo/havnarbio